# Kámt ígjøgnum sirmatám vit sóu hús og veg



*Hósdagin í seinastu viku læt 39 ára gamli, Høgni Thomsen í Klaksvík, málningaframsýning upp í hølunum hjá Føroya Banka við Klaksvíksvegin. Høgni er í løtuni í farloyvi frá arbeiði sínum á Com Data fyri at royna seg sum listamaður burturav*

**Hesi orðini úr sanginum hjá Hans J. Glerfoss runnu mær í hug, tá eg mándagin vitjaði málningaframsýningina hjá 39 ára gamla, Høgna Thomsen í Klaksvík. Framsýningin, sum er í hølunum hjá Føroya Banka við Klaksvíksvegin, er avgjørt verd eina vitjan**

LISTAFRAMSÝNING
*Rúna Sivertsen*

Málningarnir hjá Høgna eru so naturalistiskir, at tú kennir tað nærum, sum kanst tú ganga inn í teir. Tá tú hyggur at myndunum, kennir tú veruliga angan av grasi og tara.

Myndirnar eru rættiliga hugtakandi, og hann hevur sín serstaka stíl, sum neyvan er sæddur í Føroyum áður.

Tað, sum eyðkennir málningarnar hjá Høgna, er mjørki og tám, og myndaevnini eru úr føroysku náttúruni, við ikki heilt sørt av útlendskum dámi.

Høgni sigur, at hann altíð hevur havt hug at mála. Helst síðani áðrenn eg var føddur, leggur hann skemtandi aftrat.

- Mær hevur altíð dámt naturalistiskar myndir; tað geri eg enn, sigur hann.

Høgni sigur, at tá ið tú byrjar at mála, skulu málningarnir helst verða fotorealistiskir.

- Soleiðis var eisini hjá mær; men tað arbeiðir tú teg seg so við og við burtur úr.

Teir 25 oljumálningarnir, sum eru við á framsýningini hesaferð, eru allir málaðir í ár.

Høgni hevur nýtt ein málihátt, sum minnir um tann, ið verður nýttur til vatnlitsmyndir. Litirnir verða lagdir á tað, sum listamenn kalla "vátt í vátt".

Høgni nýtir penslar og máliknívar til málningar sínar. Onkur málningur er so at siga bert málaður við knívi. Hesin háttur krevur gott eyga og handalag, siga teir, ið skil hava fyri slíkum.

### Farloyvi frá Com Data

Høgni er farin í farloyvi frá arbeiði sínum á Com Data; hann ætlar at royna, um til ber at liva av at selja málningar.

Spurdur, um hann hevur nakað listafólk sum fyrimynd, svarar hann: - --- Nei, tað havi eg ikki, men mær dámar væl verkini hjá Rembrandt.

Millum málningarnar er ein av Múla. Ein einastandandi vakur málningur, sum eyguni aftur og aftur fella á.

- Hatta er mín nýggjasti málnigur, sigur Høgni.

Hann sigur, at tað vísir seg, sum tú altíð er best nøgdur við sítt seinasta verk.



*Málningarnir hjá Høgna eru rættiliga hugtakandi, og hann hevur sín serstaka stíl, sum neyvan er sæddur í Føroyum áður. Tá tú hyggur at málningunum hjá Høgna, kennir tú veruliga angan av grasi og tara*



*Tað, sum eyðkennir málningarnar hjá Høgna, er mjørki og tám, og myndaevnini eru úr føroysku náttúruni, við ikki heilt sørt av útlendskum dámi*

- Tað er undarligt at síggja málningar aftur, eg málaði fyri nøkrum árum síðani, og ofta verði eg skuffaður av mær sjálvum og haldi, at málningarnir síggja barnsligir út, sigur hann.

- Men hetta kemst sjálvsagt av, at tú mennist so hvørt, sum árini ganga og førleikin at mála gerst betur og betur, leggur hann aftrat.

Høgni sigur at enda, at framsýningin er sera væl vitjað, og fólk eru hugtikin av málningunum.

Framsýningin, sum læt upp seinasta hósdag, heldur fram til fríggjadagin 18. oktobur. Opið er allar dagar frá 14-16. Hósdagin er opið til klokkan 18.

Myndirnar eru allar innrammaðar í støddunum, 80x100 , 60x80 og 40x50 cm.

Eisini ber til at síggja myndirnar á heimasíðuni hjá Høgna Thomsen; heima.olivant.fo/~hthomsen



Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú hevur meira enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum?

Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!

## Bakarasveinur

Søkt verður eftir røskum bakarasveini, at byrja sum skjótast.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

P/F HJÁ GUNLEIVI

Tlf. 22 88 38 ella 31 21 61

## Toyota Corolla 2.0D

til sølu, árg. 6/96, koyrt 119.000 km, í sera góðum standi, fyri 85.000 kr.

Nýggj summardekk og góð píkadekk á felgum.

**Tlf. 22 54 34 ella 44 92 94**

## Vaskikona

Søkt verður eftir fólki at vaska í Klaksvíkar Klubba og at byrja beinanveg.

Umsóknin skal verða stíla til:

**Klaksvíkar Klubbi**
Postrúm 182
700 Klaksvík

Ivan Johansen Bilar

## Fólk søkist til goymsluna m/k

at byrja 1. november ella skjótast tilber. Koyrikort til persónbil krevst.

Ivan Johansen Bilar

**Tlf. 313666**
**Att.: Jógvan**

## Plátusmiður

P/F Wenzel søkir eftir dugnaligum plátusmiði til plátuverkstað okkara at byrja skjótast gjørligt. Viðkomandi hevur møguleika at leiga sær eina íbúð við úýni yvir alla havnina frá okkum.

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5 · 100 Tórshavn
Tlf. 354500
Att.: Antonius Dalsgaard




Mong eru bløðini,
men BLAÐIÐ er eittans ...

Sosialurin

Ja eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 400 krónur ársfjórðingin

Samstundis eri eg við í lutakastinum um eina ferð frá

ATLANTIC AIRWAYS

Navn
Bústaður
Býur/bygd
Tel
e-mail

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2581, Sp/f Fram, 700 Klaksvík.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Hildur Josva Thomsen, Uppsalagøta 7, 700 Klaksvík.
**Innkomin sum stjóri:** Ann Thomsen, Uppsalagøta 7, 700 Klaksvík.

*Skráseting Føroya tann 14. oktober 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2664, Sp/f Lido Seafood, 220 Skálavík.

**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Linjohn Christiansen, 220 Skálavík.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Linjohn Christiansen, 220 Skálavík.
**Innkomin sum stjóri:** Sólrun Kristensen, Reynsgøta 31, 160 Argir

*Skráseting Føroya tann 15. september 2002*

*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?